*Scrabster vil vera Norðuratlantiskur oljuhøvuðsstaður:*

# Skotar fyrireika seg til føroyska oljuvinnu

*Scrabster í Norðurskotlandi ger nú fyrireikingar til at taka ímóti komandi oljuvinnuni vestan fyri Hetland og við Føroyar. Ein nýggjur felagsskapur roynir nú at eggja fyritøkum og stovnum til at gera íløgur í komandi oljuævintýrið.*




*Cirkulin vísir, hvar fyrsta oljan fer at verða framleidd millum Hetland og Føroyar. Vit siggja so hvussu miðskeiðis henda keldan liggur millum Skotland og Føroyar.*

Meðan vit í Føroyum so smátt eru farin at tosa um eina komandi oljuvinnu, so eru tey í Scrabster í Skotlandi farin undir ítøkiligar fyrireikingar, eisini hvat viðvíkur møguligari olju á føroyska landgrunninum.

Skotsk bløð bóru nú um dagarnar tíðindini um nýggja felagsskapin "Score" (Scrabster and Caithness Offshore Related Enterprise), sum varð settur á stovn fyri tveimum vikum síðani og hvørs endamál er at tryggja, at økini í norðara parti av Skotlandi vera við í eini komandi oljuvinnu vestan fyri Hetland og við Føroyar.

Eitt av teimum stóru bløðunum í norðari parti av Skotlandi skrivar m.a.:

"Score was established this week to press the county´s claim to be the natural gateway for companies developing not only the reserves west of Shetland but also the fields around the Faroe Islands."

Við øðrum orðum gera skotar seg nú út til at taka ímóti eini komandi oljuvinnu á føroyskum øki eisini. Sagt verður, at býrinir í norðara parti av Skotlandi eru náttúrliga porturið til tænastur ol. hjá komandi oljuvinnuni vestan fyri.

Umboð fyri nýggja felagsskapin halda, at tað fer at vera bíligari hjá oljufeløgunum at útvega sær tænastur í Scrabster heldur enn í Aberdeen, sum varð bygdur út til at tæna oljuvinnuni í Norðsjónum.

Vinnulívið í Norðurskotlandi heldur tað er so sjálvsagt, at plássini á eysturstond og norðurstrond Skotlands verða tey, sum í framtíðini fara at tæna komandi oljuvinnuni vestan fyri Hetland og sum sagt í føroyskum øki eisini.

**Útbyggja havnina í Scrabster**

Víst verður á, at ein ætlan er gjørd fyri at menna alt hetta økið komandi 15 árini fyri tilsamans 100 milliardir krónur.

Tosað verður um at geva Scrabster sama leiklut í oljuvinnuni vestan fyri sum Peterhead hevur havt eystan fyri.

Ætlanin er tí m.a. at gera eina íløgu upp á 150 mill. kr. í havnini í Scrabster. Havnin skal dýpast soleiðis at hon kann taka ímóti størri skipum. Hetta fer at skapa møguleikar hjá nógvum smáídnaði at leggja um til frálandavinnu. Eisini fer virksemi her at fáa stóran týdning fyri infrastrukturin, eitt nú jarnbreytina.

Í nýggja felagsskapinum eru bæði privatar fyritøkur og almennir menningarstovnar so sum "Highland Regional Council", "Caithness and Sutherland Chamber of Commerce" oo.




*Skotsk bløð nevna alsamt oftari Føroyar*

**Møttu á oljuráðstevnu**

Tað er greitt, at ein komandi oljuvinna vestan fyri Hetland fer at fáa stóran týdning fyri útjaðaraøkini í Skotlandi og ikki minst fyri oyggjarnar norðan og eystanf͏:ri.

Á stóru oljuráðstevnuni í Aberedeen herfyri vóru hesi øki eisini væl umboðað. Tey vilja gera alt tey kunnu fyri at fáa oljufeløgini at vísa júst teirra økjum áhuga. Og tað er greitt, at tess nærri tænastuplássini liggja við komandi oljukeldurnar vestan fyri Hetland, tess størri møguleiki er at fáa ein part av køkuni. Aberdeen, sum hevur verið oljubýurin burturav, tá talan er um oljuvinnu í Norðsjónum, liggur í so langt burturi taka vit nýggju oljuøkini vestanfyri. Her er so ikki bert talan um pláss sum Scabster. Hetlendingar, orknoyingar og íbúgvarnir á Hebridunum vilja fegnir allir vera við í komandi oljuvinnuni vestan fyri Hetland.

**Klokkur ringja í Føroyum?**

Eingin ivi er um, at tíðindi um at skotar hava tikið seg saman í felagsskap at fyrireika seg at taka ímóti eini komandi oljuvinnu í føroyskum øki eisini eigur at fáa onkrar "klokkur" at ringja í Føroyum eisini. Tí tað kann koma at vera talan um beinharða kapping millum havnabýirnar í Skotlandi og á oyggjunum har og so Føroyar um at kunna veita ta bestu, bíligastu og ikki minst skjótastu tænastuna til eina komandi frálandavinnu í øllum økinum.

jan




*Umboð fyri vinnulívið og almennar stovnar í Hetlandi á ráðstevnu í Aberdeen í heyst um komandi oljuvinnuna vestan fyri Hetland. Útjaðaraøkini fyri norðan royna alt tað tey kunnu fyri at marknaðarføra seg sum tænastupláss hjá stóru oljufeløgunum, nú oljuævintýr tekur seg upp millum Føroyar og Hetland. Mynd jan*

## Klaksvíkingar eru eisini við í tax-free skipanini

Hósdagin stóð grein í blaðnum um, at fleiri av handlunum í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar kommunu eru við í tax-free skipanini, og at eisini fleiri handlar í Havn hava roynt hesa skipan.

Men mangt bendir á, at uppaftur fleiri handlar eisini aðrastaðni í landinum longu eru við í tax-free skipanini. Vit hava eitt nú fingið at vita, at onkur handil í Klaksvík hevur verið við í skipanini síðsta hálva árið, so alt bendir á, at skipanin er við at breiða seg runt alt landið.

hj.